## Møguleikar í íshavinum

Klimabroytingar merkja, at donsk reiðaríir nú síggja ein møguleika í at sigla frá Atlantshavinum til Stillahavið umvegis sonevndu landnyrðingsleiðina norður um Russland. Tað annars óframkomiliga økið er byrjað at gerast ísfrítt um sumrarnar og tað merkir, at reiðaríini kunnu sigla tann vegin heldur enn tann longra og vandamiklara vegin gjøgnum Miðalhavið, Suez-kanalina og Adén-víkina, har hópurin av sjórænarum liggja upp á lúr. Tað skrivar danska blaðið Politiken.



## Snýta tað almenna

Sambært fíggjarætlanini hjá norsku stjórnini fær ríkiskassin 190 milliardir norskar krónur í meirvirðisgjaldi í ár. Tað svarar til 20 prosent av øllum inntøkunum hjá ríkiskassanum. Men í veruleikanum skuldi talið verið nógv størri, sigur Jørgen Kosmo, sum er ríkisgrannskoðari. Hann sigur við NRK, at reglurnar eru soleiðis háttaðar, at tær næstan eggja fólki at snýta, og sjálvur heldur hann, at ríkiskassin missir einar 30 milliardir norskar krónur um árið, tí fólk og fyritøkur snýta við meirvirðisgjaldinum.



*Tá ið Sigrun varð kallað til lands, fór hann til Leirvík og lá har eina viku. Síðan hevur hann ligið bundin í Klaksvík*

# Sigrun fer undir hamaran

**Sjey mánaðir eru gingnir, síðan trolbáturin Sigrun varð tikin fyri ólógligan fiskiskap. Málið er framvegis ikki komið fyri rættin**



*Reiðarin Jónsvein Knudsen hevur slept endanum*

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

3. august í fjør varð trolbáturin Sigrun úr Saltangará tikin. Hann kom til lands, og skiparin varð ákærdur fyri at hava fiskað ólógliga.

Í fyrsta umfari góðtók skiparin sektaruppskoti, sum var, at hald varð lagt á veiðu og reiðskap, og bótin til skiparan var 100.000 krónur.

Men málið endaði ikki har. Ákæruvaldið kom við nýggjum kravi, sum var, at reiðaríið skuldi seta eina millión krónur í veð fyri at kunna loysa Sigrun aftur.

Tað noktaði reiðarin, tí hann hevði ikki tann pengin.

Orsøkin til hetta kravið var, at ákæruvaldið hevði illgruna um, at Sigrun fleiri ferðir hevði fiskað ólógliga, og so fór eitt drúgt kanningararbeiði í gongd.

28. desember var ákæruvaldið liðugt við ákærusitið, sum var 15 blaðsíður, og har eru 18 ákærur um ólógligan fiskiskap, frá januar í fjør fram til fyrst í august, tá ið Sigrun varð tikin.

Finn Ougaard, varafúti dugir ikki at siga, hví málsviðgerðin hevur tikið so drúgva tíð, tí hann hevur ikki verið inni í málinum fyrr enn nú.

Reiðarin Jónsvein Knudsen skilir einki av nøkrum av tí seinu málsviðgerðini.

– Frá tí at Sigrun varð tikin, og til ákæruritið kom, hoyrdu vit millum lítið og einki frá ákæruvaldinum, sigur hann.

### Fleiri spurningar

Reiðarin vísir ikki aftur, at Sigrun fiskaði ólógliga, og var tað so, var í lagi at revsa hann.

– Men hví skuldi hetta málið draga so nógv út? Hví ikki bara lata hann fáa sektina og so lata hann fara út aftur? spyr Jónsvein Knudsen.

Ta fyrstu vikuna lá Sigrun í Leirvík, síðan varð hann fluttur til Klaksvíkar, har ætlan var at klassa hann. Sigrun liggur framvegis í Klaksvík.

Av og á hava teir hugt til bátin.

Jónsvein Knudsen valdi næstan beinanvegin at siga menninar, sum nýttir vóru á bátinum, upp, soleiðis at teir kundu koma undir ALS.

### Løgið

Hann hevur nú mist allar vónir um at kunna gera Sigrun út aftur. Jónsvein Knudsen hevur stutt sagt slept endanum og boðað bankanum frá tí.

Hann heldur mangt løgið vera í hesum málinum. Tað fyrsta var, at ákæruvaldið fyrst gav bátinum vanliga sekt, men síðan kravdi, at reiðaríið skuldi veita eina millión krónur í trygd.

– Og tá ákæruritið kom, var ikki bara skiparin men eisini eg sum reiðari ákærdur.

Reiðariið, sum ákært er, eitur Sp/f á Heygnum.

Sigrun stendur í 16 milliónum, og persónliga hevur Jónsvein Knudsen mist 3,6 mió. krónur, sum hann setti i skipið, tá ið tað varð keypt.

Ógreitt er, nær málið um trolbátin Sigrun kemur fyri rættin. Tað verður eingin fongur fyri ríkiskassan, at báturin verður seldur á tvingsilssølu, tí so nógv skuld er í honum

## Arbeiðstíðin kostaði mest

**Hummarmálið kostaði ríkiskassanum 100.000 krónur í sakføraraútreiðslum**

FØROYA RÆTTUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Ákæruvaldið, fýra sakførarar og Føroya rættur brúktu nógva orku uppá sakarmálið móti tveimum journlistum, einum fotografi og einum hummarafiskara fyri ávikavist at hava etið og borðreitt við livandi hummara á eini fiskivinnuframsýning í Føroyum í mai 2005.

Ákæruvaldið legði út við at geva hesum fýra monnum og eini donskum fotografi 1000 krónur í bót fyri djórapínslu. Danski fotografurin rindaði beinanvegin bótina, men hinir noktaðu seg sekar, og so fór eitt størri arbeiði í gongd við nógvari brævskriving og fleiri rættarfundum.

Í heyst vórðu teir allir frídømdir, og ákæruvaldið skeyt ikki málið inn fyri hægri rætt.

Sambæt upplýsingum frá fútaskrivstovuni og einum frídømdum vóru sakføraraútreiðslurnar 100.000 krónur.

Annars vóru ongar serligar útreiðslur, tí eingi vitni komu til Føroya at vitna, og danski fotografurin og sakførari hansara komu ikki til Føroya á nakran rættarfund.

Ongar ferðaútreiðslur vóru tí.

Serfrøðin bæði í Føroyum og í Danmark fingu nakrar spurningar um hummarar, men tað kostar einki at spyrja almennar stovnar, upplýsir Finn Ougaard, varafúti.

Ógjørligt er at gera upp, hvat málið í tíð kostaði ákæruvaldinum og dómsvaldinum, men tímarnir vóru ómetaliga nógvir, sum ákæruvaldið og dómsvaldið hava brúkt.